2027
2026
2025
2024
2023

Fíggjarmálaráðið

# Búskaparfrágreiðing I

Mars 2022

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 ....... 3**

**Inngangur ....... 13**

**Lýsing av gongdini í búskapinum ....... 14**

*Kríggið í Ukraina fer at raka vøksturin og hækka prísir – men arbeiðsloysið verður neyvan høgt* ....... 14
*Ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum fer helst at minka* ....... 17
*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum* ....... 18
*Eftirspurningur og brúkaraprísir* ....... 21
*Gongdin í til- og fráflyting* ....... 23

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni ....... 25*

*Heimsbúskapurin ....... 27*

*Almenn fíggjarmál ....... 28*

Løgtingið

**Tórshavn**, 31. mars 2022

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2023**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 verður 6.606,5 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 6.056,5 mió. kr., og løgukarmurin verður 550,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 6.484,0 mió. kr.

Framskrivaða úrslitið í løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 er -122,5 mió. kr. Framskrivaðu játtanarkarmarnir vísa, at neyðugt verður við átøkum á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans fyri tilsamans um 30 mió. kr. fyri at røkka ætlaða úrslitinum í 2023, sum er eitt hall á 92,5 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2023 býttir á greinar.

| **Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2023** | | |
|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
| § 1 Løgtingið | 75,7 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 45,1 | 3,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 707,9 | 411,4 |
| § 5 Fiskivinnumál | 168,4 | 0,0 |
| § 6 Umhvørvis- og vinnumál | 170,8 | 8,0 |
| § 7 Uttanríkis- og mentamál | 1.372,6 | 66,3 |
| § 11 Heilsumál | 1.524,2 | 24,3 |
| § 12 Almannamál | 1.991,8 | 37,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **6.056,5** | **550,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **6.606,5** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **6.484,0** | |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | **-122,5** | |
| **Átøk at betra úrslitið** | **30,0** | |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | **-92,5** | |

Til tess at røkka ætlaða úrslitinum í løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 er grundarlagið tær givnu fyritreytirnar fyri framskrivingum á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans, soleiðis sum lýst í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar.

**Viðmerkingar**
Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur við hesum vegna landsstýrið fram uppskot til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri løgtingsfíggjarlógina í 2023.

Við játtanarkørmunum, ið sambært § 8, stk. 1 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan skulu verða lagdir fram innan 1. apríl, ásetir Løgtingið yvirskipaða fíggjarpolitiska karmin fyri komandi árið.

Játtanarkarmarnir fyri 2023-2027 leggja dent á at minka hallið hjá landinum, sum væntast at vera í 2022 og 2023. Landskassin hevði hall í 2020, avlop í 2021 og hevur væntandi hall aftur í 2022. Landsstýrið ætlar at betra úrslitið hjá landskassanum stigvíst næstu árini við 30 mió. kr. um árið soleiðis, at hallið skal minka í 2023 og roknað verður við javnvág aftur í 2025. Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma aftrat næstu árini, verður neyðugt at økja átøkini samsvarandi.

**Framskrivingarfortreytir fyri játtanarkarmarnar 2023-2027**
Endamálið við framskrivaðu játtanarkørmunum fyri 2023-2027 er, at teir skulu vísa framskrivaðu gongdina í útreiðslum og inntøkum landsins næstu 5 árini við galdandi lóggávu og verandi virksemisstigi uttan politiska viðgerð.

Niðanfyri eru lýstar framskrivingarfortreytirnar fyri ymsu játtanarsløgini. Kríggið í Ukraina hevur longu havt stórar búskaparligar avleiðingar fyri heimin og eisini fyri Føroyar. Fyribils verður roknað við, at avleiðingarnar í stóran mun vera í 2022 og í minni mun í 2023. Útreiðslur vegna kríggið í Ukraina, tildømis til flóttafólk, eru ikki innroknaðar í játtanarkarmarnar.

**Rakstrarjáttanir**
***Lønarframskrivingar***
Framskrivað verður vektað fyri kendar lønarhækkingar í 2023. Nakrir almennir lønarsáttmálar eru galdandi inn í 2023, og einstakir heilt fram til 1. oktober 2024, og hesir verða brúktir sum grundarlag fyri framskrivingunum. Framskrivað er við 2,41%, svarandi til slakar 67 mió. kr. í lønarhækkingum í 2023.

Fyri ávísar játtanir, har serstøk lønarviðurskifti gera seg galdandi, verður framskrivað fyri hesum, so sum sáttmálasett ístaðin fyri tænastumenn, og gamlar lønarhækkingar, sum sláa út sum útreiðslur í verandi sáttmálaskeiði.

***Prísvøkstur***
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki verður framskrivaður, men tó verður hetta gjørt fyri ávísar játtanir, har stórur prísvøkstur vanliga er.

***Ársins prísir 2023, men fastir (realir) prísir 2024-2027***
Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framroknað í ársins prísum í 2023. Árini 2024-2027 eru framroknað í føstum prísum, tað merkir, at ongin lønar- og prísvøkstur er íroknaður.

***Bundnar raðfestingar***
Nýtt ella broytt virksemi skal meginregluliga játtast fyri alt árið, tá ið tað byrjar. Er tó talan um virksemi, sum ikki er tikið við fyri alt árið í 2022, skal hetta framskrivast til heilt ár fyri 2023. Framskrivast skal á sama hátt fyri virksemi, sum broytist stigvíst í tíðarskeiðnum 2023-2027,

sum til dømis útrulling av nýggjari útbúgving ella eykaflokkum. Øvugt skal eisini framskrivast fyri virksemi, sum ætlast at enda ella minka í vavi í tíðarskeiðnum 2023-2027.

***Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting***

Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hava við sær, at neyðugt verður at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum fyri at verandi virksemisstig verður varðveitt.

***Rentustøði og oljuprísur***

Játtanarkarmarnir verða gjørdir við verandi rentustøði, og at oljuprísurin er hækkaður við 2 kr. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið og oljuprísurin kunnu broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul, og útreiðslur til olju eisini broytast. Framskrivað verður bert fyri játtanir, har oljuútreiðslurnar fylla lutfalsliga nógv.

**Fyritreytir fyri lógarbundnum játtanum**

***Fólkavøkstur, broytt fólkasamanseting og aðrar virksemisbroytingar***

Í mun til galdandi lóggávu er framskrivað við virksemisbroytingum, orsakað av til dømis fólkavøkstri og broyttari fólkasamanseting, og metingum av útreiðslugongdini út frá kendum viðurskiftum, sum hava við sær virksemisbroytingar.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum rakstrarvøkstri fyri 2023-2027**

| *Mió. kr.* | ***FL2022*** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | *154,0* | 162,0 | 169,0 | 175,5 | 180,0 | 184,5 |
| Strandfaraskip landsins | *211,8* | 237,3 | 233,5 | 233,5 | 233,5 | 233,5 |
| Fólkaskúlin | *410,4* | 421,3 | 423,8 | 426,3 | 428,8 | 431,3 |
| Fróðskaparsetur Føroya | *130,7* | 142,1 | 144,8 | 147,1 | 147,1 | 147,1 |
| Lestrarstuðul | *131,9* | 138,0 | 141,9 | 145,8 | 146,9 | 148,0 |
| Heilsutrygdarveitingar | *239,5* | 255,1 | 267,8 | 281,2 | 295,3 | 310,0 |
| Landssjúkrahúsið | *873,3* | 884,2 | 898,1 | 912,2 | 926,7 | 941,5 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | *58,6* | 65,6 | 67,9 | 70,3 | 72,8 | 75,3 |
| Trivnaðartænastur | *369,4* | 401,2 | 407,7 | 416,2 | 424,7 | 433,2 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk | *123,7* | 134,6 | 141,7 | 148,7 | 155,4 | 161,3 |
| Fólkapensjón | *648,6* | 669,9 | 688,2 | 709,5 | 733,3 | 758,7 |
| Fyritíðarpensjón | *307,8* | 324,9 | 338,5 | 353,0 | 367,6 | 382,3 |
| **Útvaldar rakstrarútr. tils.** | **3.659,8** | **3.836,2** | **3.923,0** | **4.019,1** | **4.111,9** | **4.206,5** |
| | | | | | | |
| **Rakstrarútr. tilsamans** | **5.752,4** | **6.056,5** | **6.142,0** | **6.243,9** | **6.345,6** | **6.447,9** |

**Tænastumannaeftirlønir**

Framskrivað er við mettari árligari nettotilgongd av tænastumonnum, sum fara frá fyri aldur. Størsta tilgongdin síðstu árini hevur verið lærarar, men frá 2025 byrjar tilgongdin at minka, tí at lærarar síðani 1998 ikki eru settir sum tænastumenn.

**Strandfaraskip Landsins**
Lagt er upp fyri, at oljuprísurin er á sama støði sum í 2022, umframt lønarhækkingar. Í 2024 verður sandoyarleiðin niðurløgd í sambandi við, at Sandoyartunnilin verður tikin í nýtslu. Innroknað er, at sparingin verður brúkt á farleiðini, tvs. sum stuðul til P/F Eystur- og Sandoyartunlar.

**Fólkaskúlin**
Játtanin til fólkaskúlan er í størstan mun læraralønir. Lønarhækking er framskrivað í 2023. Framskrivað er eisini við hægri pensjónsútreiðslum, sum stava frá, at sáttmálasettir lærarar verða í staðin fyri tænastumenn, ið fáa sína pensjón útgoldna av játtanini til tænastumannaeftirlønir.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Økt virksemi vegna upptøku av fleiri sjúkrarøktarfrøðingum, upptøku til BA í KT-verkfrøði hvørt ár, og nýggja útbúgving til MA í KT-verkfrøði.

**Lestrarstuðul**
Játtanin er framskrivað í sambandi við økt virksemi á Fróðskaparsetri Føroya, sum er upptøka av fleiri sjúkrarøktarfrøðingum, upptøka til BA í KT-verkfrøði hvørt ár, og nýggj útbúgving til MA í KT-verkfrøði. Roknað verður eisini við fleiri lærusáttmálum.

**Heilsutrygdarveitingar**
Í mun til metta nýtslu í 2022 er játtanin framskrivað við 6,5% í 2023 og við 5% í føstum prísum frá 2024 til 2027. Framskrivingin er vegna fólkavøkstur, broytingar í fólkasamanseting, hægri takstir o.a.

**Landssjúkrahúsið**
Framskrivingin er vegna fólkavøkstur, broytingar í fólkasamanseting, umframt at serviðgerð uttanlands í 2023 er framskrivað við 5% árliga og 3,5% í føstum prísum frá 2024 til 2027. Framskrivað er eisini fyri, at H-bygningurin er tikin fult í nýtslu og at flutt verður úr ótíðarhóskandi bygningum.

**Serstakur sjúkrahúsheilivágur**
Framskrivað er í mun til mettu nýtsluna í 2022. Framskrivað er við 5% í 2023 og við 3,5% í føstum prísum frá 2024 til 2027.

**Trivnaðartænastur**
Lønarhækking er framskrivað í 2023, umframt at framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum. Í 2023 er framskrivað við, at tveir nýggir bústovnar verða tiknir í nýtslu. Eisini er framskrivað við, at flutt verður úr ótíðarhóskandi bústovnum.

**Arbeiðsfremjandi tiltøk**
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum í skipanini. Veitingarnar eru framskrivaðar við lønarhækking hjá arbeiðarafeløgunum í 2023. Framskrivað er eisini við, at kravda pensjónsgjaldið hækkar 1%-stig árliga fram til 2026, tá komið er uppá 12%.

**Fólkapensjón**
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 1,25% í 2023.

**Fyritíðarpensjón**
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 1,25% í 2023.

**Fyritreytir fyri løgujáttanir**
***Samtyktar løguverkætlanir***
Framskrivað verður sambært ætlaða útreiðsluprofilinum, soleiðis sum hann er tikin við í verklagslóg, viðmerkingunum til verklagslóg, og viðmerkingunum til løgujáttanina í fíggjarlógini fyri 2022.

***Verkætlanir sambært langtíðarløguætlanini***
Aðrar verkætlanir verða framskrivaðar sambært langtíðarløguætlanini. Løgukarmurin er ásettur til 525-550 mió. kr. í tíðarskeiðnum 2023 til 2027.

Stuðul til løguverkætlanir hjá kommunum verða tiknar við sum løgujáttanir í løgukarminum. Somuleiðis eru í løgukarminum innroknaðar løgukendar útreiðslur, so sum partapeningur í feløg, sum fremja størri samferðsluverkætlanir, størri KT-verkætlanir og løgustuðul til sjálvsognarstovnar.

| **Talva: Løgukarmur fyri 2023-2027** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2022*** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** |
| **Løguútreiðslur tilsamans** | ***566,2*** | **550,0** | **535,0** | **525,0** | **525,0** | **525,0** |

**Tunlar Norður um Fjall**
Sambært verklagslógini kostar verkætlanin 522 mió. kr. Arbeiðið við tunnilsgerðini gongur skjótt og væl. Verkætlanin er mett at verða liðug í 2024.

**Fámjinstunnilin**
Fyri at fáa eina hóskandi farleið til Fámjins, verður ein tunnil við tilhoyrandi vegagerð gjørdur. Sambært uppskoti um at broyta verklagslógina um Fámjinstunnil, fer verkætlanin at kosta 207 mió. kr.

**Tunnil til Dals**
Vegurin til Dals er als ikki hóskandi. Arbeitt verður við at gera tunnil til Dals. Byrjað varð upp á verkætlanina á vári 2019. Arbeitt verður mett at taka 6-7 ár, alt eftir hvussu stór játtan verður veitt til verkætlanina árliga.

**Uttari ringvegur til Tórshavnar**
Uttari ringvegur verður gjørdur at leiða ferðsluna uttan um Havnina og inn til býin við íbindingarvegum, og at betra ferðsluviðurskiftini, framkomuleika og flytføri fyri alt landið. Landið stuðlar verkætlanina við í mesta lagi 110 mió. kr.

**Innkomuvegur til Runavíkar**
Fyri at betra um ferðsluviðurskiftini til og frá tunlinum ígjøgnum Runavík, Saltangará og Glyvrar, verður nýggjur Fjøruvegur gjørdur at leiða serliga ta tungu ferðsluna til og frá Eysturoyartunlinum, burtur frá høvuðsvegnum í Runavík. Landið veitir upp til 55 mió. kr. í stuðuli.

**Sjóvinnustýrið í Vágum**
Nýggjur bygningur verður bygdur á Giljanesi til Sjóvinnustýrið fyri samanlagt 30 mió. kr. Verkætlanin er mett at verða liðug í 2023.

**Miðnám á Kambsdali**
Ætlanin er at byggja náttúruvísindaliga økið av nýggjum, útbyggja felags økið, køkin, serbreytina og FabLab, umframt at gera síðstu útbyggingina lidna. Uppskot til verklagslóg er lagt fyri Løgtingið, og er kostnaðurin mettur til 71 mió. kr.

**Húsarhaldsskúlin í Klaksvík**
Ætlanin er at byggja nýggjan Húsarhaldsskúla í Klaksvík. Sambært galdandi heimildarlóg letur landið 21 mió. kr. í stuðuli til verkætlanina. Løgtingið hevur játtað 4 mió. kr. afturat til verkætlanina í 2022.

**Klaksvíkar sjúkrahús**
Ætlanin er at dagføra læknahúsini, Gula húsið, soleiðis at umsitingin kann flyta úr Starvsfólkabygninginum í Gula húsið. Uppskot til verklagslóg er lagt fyri Løgtingið, og er kostnaðurin mettur til 16 mió. kr.

**Bústovnar**
Hildið verður fram við at byggja vardan bústað til fólk við menningartarni og at dagføra bygningar á almannaøkinum. Harumframt verður farið undir at fyrireika nýggjar verkætlanir.

**Eystur-og Sandoyartunlar**
Sandoyartunnilin letur upp fyri ferðslu í desembur 2023. Eftir lógini setur landið 400 mió. kr. í felagið, 50 mió. kr. árliga til 2024. Harumframt eru 35 mió. kr. játtaðar í ferðsluveðhaldi í 2022. Væntandi fer ferðslan gjøgnum Eysturoyartunnilin at vaksa so líðandi, soleiðis at veðhaldið bert er effektivt í styttri áramál.

**Fyritreytir fyri stuðulsjáttanum**
Sum meginregla eru stuðulsjáttanir framskrivaðar við óbroyttari upphædd uttan so, at serstøk viðurskifti eru galdandi, til dømis virksemi, ið heldur uppat, ella bindandi avtala um stuðulshækking, um tað so er eingangs ella varandi.

## Fyritreytir fyri inntøkujáttanum og rentum

### *Rentustøði*

Fyritreytirnar fyri rentuframskrivingunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini. Rentuútreiðslurnar eru ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið kann broytast og væntast at hækka næstu 1-2 árini, og harvið kunnu rentuútreiðslur av landskassaskuldini eisini broytast.

### *Inntøkujáttanir*

Inntøkurnar verða framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar. Fyri ávísar inntøkujáttanir verður í framrokningunum lagt upp fyri serligum viðurskiftum í einstøkum vinnugreinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum, og sum í stóran mun fylgja vøkstrinum í BTÚ.

### *Fastur (realur) inntøkuvøkstur 2024-2027*

Sum vanligt er í játtanarkørmunum verður framroknað í ársins prísum í 2023. Árini 2024-2027 eru framroknað í føstum prísum, tað merkir, at framroknað er við realum inntøkuvøkstri uttan lønar- og prísvøkstur.

**Talva: Útvaldar inntøkujáttanir við størstu broytingunum**

| *Mió. kr.* | ***FL2022*** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Vanligur landsskattur | *1.830,0* | 1.890,0 | 1.930,0 | 1.970,0 | 2.010,0 | 2.050,0 |
| Felagsskattur | *390,0* | 400,0 | 410,0 | 420,0 | 430,0 | 440,0 |
| Kapitalvinningsskattur | *290,0* | 295,0 | 300,0 | 305,0 | 310,0 | 315,0 |
| Meirvirðisgjald | *1.940,0* | 2.010,0 | 2.050,0 | 2.090,0 | 2.130,0 | 2.170,0 |
| Loyvisgjald á alivinnu | *195,0* | 210,0 | 215,0 | 220,0 | 225,0 | 230,0 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | *312,0* | 300,0 | 300,0 | 300,0 | 300,0 | 300,0 |
| Útluting frá alm. p/f og gr. | *91,7* | 80,0 | 80,0 | 85,0 | 90,0 | 95,0 |
| Heildarveiting | *641,8* | 641,8 | 641,8 | 641,8 | 641,8 | 641,8 |
| **Útvaldar inntøkur tils.** | ***5.690,5*** | **5.826,8** | **5.926,8** | **6.031,8** | **6.136,8** | **6.241,8** |
| | | | | | | |
| **Inntøkur tilsamans** | ***6.356,8*** | **6.484,0** | **6.591,0** | **6.686,8** | **6.788,0** | **6.887,9** |

Størstu inntøkukeldurnar hjá landinum eru vanligi landsskatturin og meirvirðisgjaldið, sum tilsamans eru um 60% av samlaðu inntøkunum hjá landskassanum.

### Vanligur landsskattur

Mett verður, at vanligi landsskatturin í 2023 hækkar góð 3% sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2022. Árini 2024 til 2027 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

### Felagsskattur

Roknað verður við varisligum vøkstri í felagsskattinum næstu árini.

**Kapitalvinningsskattur**
Roknað verður við varisligum vøkstri í kapitalvinningsskattinum næstu árini.

**Meirvirðisgjald**
Viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum er roknað við vøkstri á góð 3% í 2023 sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2022. Árini 2024 til 2027 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

**Loyvisgjald á alivinnu**
Roknað verður við, at tøkan kann hækka nakað næstu árini og sostatt eisini loyvisgjaldið á alivinnu. Roknað verður við framhaldandi góðum prísum á aldum laksi á heimsmarknaðinum.

**Avgjald á fiskatilfeingi**
Óvissa er um avgjaldið á fiskatilfeingi næstu árini, serliga um semjurnar millum strandarlondini um uppsjóvarfisk og um fiskiveiðuavtalurnar við Russland. Roknað verður við umleið somu inntøkum komandi árini.

**Útluting frá almennum feløgum og grunnum**
Onki serstakt vinningsbýti verður frá BankNordik í 2023 og framskrivað er samsvarandi meting bankans, umframt vinningsbýti frá øðrum feløgum, millum annað Føroya Tele.

**Uppskot til játtanarkarmar 2023-2027**
Uppskotið til játtanarkarmar byggir á løgtingsfíggjarlógina fyri 2022 og framskrivingar fyri tíðarskeiðið 2023 til 2027. Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2023 til 2027 útgreinað og býtt á greinar og ár.

| **Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2023-2027** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2022*** | **2023** | **2024** | **2025** | **2026** | **2027** |
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | *72,4* | 75,7 | 74,0 | 73,3 | 73,6 | 76,9 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | *42,0* | 45,1 | 43,6 | 42,9 | 43,5 | 43,8 |
| § 3 Fíggjarmál | *585,3* | 707,9 | 711,1 | 717,6 | 722,1 | 726,6 |
| § 5 Fiskivinnumál | *163,4* | 168,4 | 170,4 | 168,4 | 168,4 | 168,4 |
| § 6 Umhvørvis- og vinnumál | *165,5* | 170,8 | 168,9 | 168,9 | 168,9 | 168,9 |
| § 7 Uttanríkis- og mentamál | *1.327,3* | 1.372,6 | 1.381,4 | 1.393,5 | 1.397,7 | 1.401,9 |
| § 11 Heilsumál | *1.487,9* | 1.524,2 | 1.552,2 | 1.584,3 | 1.617,6 | 1.651,9 |
| § 12 Almannamál | *1.908,6* | 1.991,8 | 2.040,6 | 2.095,0 | 2.153,9 | 2.209,5 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***5.752,4*** | **6.056,5** | **6.142,0** | **6.243,9** | **6.345,6** | **6.447,9** |
| | | | | | | |
| **Løguútreiðslur, §1-§12*** | ***566,2*** | **550,0** | **535,0** | **525,0** | **525,0** | **525,0** |
| **Rentuútreiðslur, netto**** | ***-16,4*** | **-10,3** | **-10,3** | **6,0** | **17,8** | **30,8** |
| **Inntøkur** | ***6.340,4*** | **6.473,7** | **6.580,7** | **6.692,7** | **6.805,7** | **6.918,7** |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | ***38,2*** | **-122,5** | **-86,0** | **-82,2** | **-82,7** | **-85,0** |
| **Átøk at betra úrslitið** | **-** | **30,0** | **60,0** | **90,0** | **120,0** | **150,0** |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | **-** | **-92,5** | **-26,0** | **7,8** | **37,3** | **65,0** |

**Viðm:** Tølini fyri 2022 og 2023 eru í ársins prísum. Tølini fyri 2024-2027 eru í føstum prísum. Tað vil siga, at lønar- og prísvøkstur er ikki íroknaður, hvørki á útreiðslu- ella inntøkusíðu landskassans. Tølini fyri 2022 eru sambært samtyktu løgtingsfíggjarlógini.
* Í løgukørmunum eru innroknaðar løgukendar útreiðslur. Av hesum eru 50 mió. kr. í partapeningi og 25 mió. kr. í ferðsluveðhaldi til P/F Eystur- og Sandoyartunlar.
** Rentuútreiðslur, netto er samanseting av rentuútreiðslum av lánsbrævaskuld landskassans og rentuinntøkum av gjaldføri landskassans.

**Skjal hjálagt**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2022

Fíggjarmálaráðið, 31. mars 2022

Uni Rasmussen

landsstýrismaður

/Bjarni Askham Bjarnason

# Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, harímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2023 byggir í høvuðsheitum á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2022 (løgtingsmál nr. 16/2021), men nýggjar framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, síðani av altjóða búskapinum og at enda av almenna búskapinum.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Vøkstur er í føroyska búskapinum, men stór óvissa er um gongdina næstu 1-2 árini. Stígur var í vøkstrinum í 2020 orsakað av koronufarsóttini, men hagtølini benda á, at bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) vaks aftur í 2021. Tølini eru øll í ársins prísum. Stórur vøkstur var annars í føroyska búskapinum frá 2013 til 2020. Hesi árini vaks bruttotjóðarúrtøkan úr um 15 mia. kr. til um 21 mia. kr.

Bruttotjóðarúrtøkan minkaði sambært fyribils uppgerðum um 3% í 2020. Fíggjarmálaráðið metir, at BTÚ vaks um 5% í 2021, og roknar síðani við, at BTÚ veksur um 2% í 2022 og um 3% í 2023. Væntaði vøksturin í 2022 og 2023 er treytaður av gongdini í altjóða búskapinum og serliga av viðurskiftum, sum hava við kríggið í Ukraina at gera.

**Mynd 1**
**Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 1999-2023**




Viðm.: Tølini fyri 2021 til 2023 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Mynd 1 omanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni árini 1999 til 2020 og metingar fyri árini 2021 til 2023. Føroyski tjóðarroknskapurin er gjørdur upp til og við 2020. Tølini fyri 2021 til 2023 eru metingar og forsagnir.

Størstu orsøkirnar til búskaparvøksturin í 2021 vóru, at útflutningurin hækkaði 1,6 mia. kr. ella 15%, umframt at privata nýtslan hækkaði í 2021. Harafturat hava almennar og privatar íløgur stimbrað vøksturin.

*Kríggið í Ukraina fer at raka vøksturin og hækka prísir – men arbeiðsloysið verður neyvan høgt*

Kríggið í Ukraina kom brádliga og óvæntað. Umframt ta menniskjaligu líðing, sum kríggið í Ukraina hevur við sær, fer kríggið at ávirka allan heimsbúskapin og eisini føroyska búskapin.

Búskaparligu avleiðingarnar av krígnum vera størstar í Ukraina, har stórir partar av undirstøðukervinum skulu byggjast upp aftur næstu 10-15 árini. Kríggið og tiltøkini frá vesturheiminum móti Russlandi fara helst eisini at hava við sær búskaparligt skrædl í Russlandi næstu 1-2 árini. Búskapirnir í Ukraina og Russlandi kunnu minka 25-30% í 2022.

Kríggið hevur við sær bæði beinleiðis og óbeinleiðis ávirkanir. Avleiðingarnar vera í stuttum lægri vøkstur, størri óvissa og hægri prísir. Kríggið fer at skunda undir prísvøksturin, sum longu var høgur áðrenn russisku innrásina í Ukraina. Serliga prísirnir á matvørum og á rávørum, olju og gassi, eru longu hækkaðir munandi og fara væntandi at hækka meira. Óvissan um útlitini kann fara at minka um privatu nýtsluna og hugin at gera íløgur.

Harafturat koma beinleiðis ávirkanir á føroyska útflutningin til Ukraina, Russland og Hvítarussland. Roknað verður við, at tað fer at bera til at finna aðrar útflutningsmarknaðir, men hetta verður helst til lægri prísir. Ein onnur óvissa er um fiskiveiðiavtaluna millum Føroyar og Russland og hvørt tað yvirhøvur fer at bera til at gera fiskiveiðiavtalur við Russland næstu árini.

Oljuprísurin eru sera høgir í løtuni og fara helst at tálma vøksturin og privatu nýtsluni næstu 1-2 árini. Koronufarsóttin hevði í fyrsta umfari við sær, at skrædl var í oljuprísinum mars til mai 2020. Hækkingin í oljuprísinum síðani miðskeiðis í 2020 hevur tálmað búskapin í 2020 og 2021. Higartil í 2022 eru oljuprísir hækkaðir ógvusliga, millum annað orsakað av krígnum í Ukraina.

Síðstu árini er munandi ískoyti til vøksturin komið av privatum og almennum íløgum. Kríggið í Ukraina og óvissan um útlitini fara sannlíkt at minka hugin hjá fyritøkum og húsarhaldum at gera stórar íløgur, men framhaldandi kann roknast við nógvum almennum og privatum íløgum næstu 1-2 árini.

Síðstu 5-6 árini er privata nýtslan vaksin javnt og støðugt. Kríggið í Ukraina og høgi prísvøksturin, sum kann væntast at halda fram næstu 1-2 árini, fara helst at tálma privatu nýtsluna, tí tøka inntøkan fer helst at lækka.

Í løtuni hava myndugleikar tamarhald á koronufarsóttin. Tí roknar Fíggjarmálaráðið ikki við stórvegis ávirkan av farsóttini á búskapin í 2022 ella í 2023.

Áðrenn innrásina í Ukraina høvdu miðbankar í USA og Evropa givið ábendingar um, at leiðandi renturnar helst hækka nakrar ferðir í 2022. Hetta var neyðugt fyri at tálma prísvøkstri og at fyribyrgja, at búskapirnir vera ovhitaðir.

Kríggið í Ukraina kann gera, at miðbankar bíða við ætlanunum um at hækka renturnar, men enn síggjast ikki tekin um hetta. Kríggið í Ukraina hevur havt ein uppaftur størri prísvøkstur við sær, sum í sjálvum sær skundar undir miðbankarnar at hækka renturnar. Hóast rentustøðið er hækkað nógv fyrstu mánaðirnar í 2022, er rentustøðið framvegis lágt. Flestu búskaparfrøðingar og eygleiðarar rokna við, at rentustøðið hækkar, sum frálíður.

Tekin um fløskuhálsar hava verið í pørtum av búskapinum í nøkur ár og eru tað framvegis. Fløskuhálsarnir kunnu hava við sær stórar prís- og lønarhækkingar. Fløskuhálsar síggjast til dømis á arbeiðsmarknaðinum, á bústaðamarknaðinum, og í pørtum av byggivinnuni. Grundað á stóra trotið á arbeiðsmegi í nógvum vinnugreinum, roknar Fíggjarmálaráðið ikki við høgum arbeiðsloysið næstu 1-2 árini.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum (brutto) kann metast til 55-60% av BTÚ. Skuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis væl omanfyri 100% av BTÚ, meðan skuldin hjá húsarhaldum í Íslandi er um 80% av BTÚ. Í ES er skuldin hjá húsarhaldum í miðal um 60% av BTÚ.

**Mynd 2**

**Inn- og útlán til húsarhald og vinnufeløg, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept-2013 til jan-2022**




Viðm.: Nettoinnlánini í *mynd B* eru innlán frá húsarhaldum frádrigin útlán til húsarhald í *mynd A*.
Kelda: Hagstovan.

Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum vaksin um 1% (ikki íroknað realkredittlán úr Danmark), meðan bruttoútlán til vinnukundar eru vaksin um 4% (mynd 2).

Ein broyting síðstu um trý árini er, at húsarhald í størri mun taka realkredittlán til fígging av bústøðum heldur enn bankalán. Realkredittlán til føroysk húsarhald eru vaksin um 14% síðsta árið (mynd 2B). Innlán hjá húsarhaldum í føroyskum peningastovnum eru vaksandi. Innlán hjá føroyskum húsarhaldum eru vaksin um 1% síðsta árið, og innlán hjá føroyskum vinnufyritøkum eru vaksin um 10% síðsta árið.

Sethúsaprísir eru hækkaðir nógv um alt landið síðstu 4-5 árini. Sambært bústaðartølum frá Betri Banka hækkaðu bústaðarprísir um 12% í høvuðstaðarøkinum og um 25% í Eysturoynni í 2021. Tekin eru um, at stígur fyribils er komin í príshækkingarnar fyrstu mánaðirnar í 2022. Orsakirnar kunnu vera, at rentustøðið er hækkað og óvissan, sum er íkomin av krígnum í Ukraina.

Høvuðsorsøkin til príshækkingina síðstu árini hevur verið, at útboðið er ikki vaksið í sama mun sum eftirspurningurin. Fólkatalið er hækkað við út við 6.000 fólkum síðani 2014, men sama tíðarskeið er ikki bygt samsvarandi av nýggjum húsum og íbúðum, um lagt verður til grund, at 2,5 ella trý fólk eru í hvørjum húski (mynd 3).

Virksemið í byggivinnuni er minkað nakað síðsta árið ella so, men nógvar byggiverkætlanir eru framvegis í gongd, og fleiri eru eisini væntandi næstu árini. Til dømis kann roknast við, at tørvur verður á at byggja nógvar bústaðir næstu árini, bæði eigarabústaðir og leiguíbúðir. Sambært konjunkturvísitalinum hjá Hagstovuni siga fyritøkur í byggivinnuni frá, at eftirspurningurin er um miðal. Um onnur hvør fyritøka í byggivinnuni sigur eisini, at mangul á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri at økja framleiðsluna. Fyritøkur í byggivinnuni rokna við at fáa størri tørv á arbeiðsmegi næsta árið.

**Mynd 3**

**Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í elkervið hjá SEV, 1998 til 2021**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í elkervið hjá SEV um alt landið. Myndin fevnir um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

## *Ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum fer helst at minka*

Roknast kann við, at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum lækkar í 2022 og 2023. Størstu orsakirnar eru, at uppsjóvarkvoturnar væntandi minka bæði í 2022 og 2023. Tøkan av aldum laksi er mett at hækka eitt vet í 2022 og aftur í 2023. Orsakað av góðari prísgongd, verður roknað við, at útflutningsvirðið á aldum laksi hækkar í 2022.

**Mynd 4**

**Tøka av aldum laksi og sílum í kruvdari vekt, býtt á ár, 1996 til 2022**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum. Tøkan í 2022 er leystlig meting við óvissu.
Kelda: Hagstovan og Búskaparráðið.

Síðstu árini eru stórar íløgur gjørdar í smoltstøðir og kryvjivirki, og næstu 1-2 árini verða eisini gjørdar stórar íløgur. Úrslitini av íløgunum síggjast í størri tøku, og miðalstøddin á smoltum, sum verða sett út, er hækkað úr um 150 gramm í 2015 til um 370 gramm í 2020. Útbyggingarnar fara væntandi at hava við sær, at framleiðslan av smolti á landi kann hækka, at miðalstøddin á smoltum hækkar til um 500 gramm og at vakstrartíðin á sjónum minkar úr um 18 mánaðir til um 12 mánaðir.

Tøkan av alilaksi var millum 60 og 78 tús. tons í kruvdari vekt frá 2012 til 2020. Í 2021 vaks tøkan til omanfyri 90 tús. tons í kruvdari vekt. Mynd 4 omanfyri vísir tøku av aldum laksi síðani 1996 og mettu tøkuna í 2022.

Í 2021 hækkaðu miðalprísir á aldum laksi, sum í stóran mun kom av færri koronuavmarkingum í Evropa og USA. Miðalprísurin á fishpool vísitalinum var 5,2 EUR/kg í 2020 og um 5,7 EUR/kg í 2021. Fyrstu mánaðirnar í 2022 er fishpool vísitalið hækkað munandi sammett við í 2021, og prísirnir á alilaksi eru methøgir.

Útlit eru fyri, at prísgongdin á aldum laksi verður góð næstu 1-2 árini. Eftirspurningurin eftir aldum laksi veksur skjótt, umframt at roknast kann við færri koronuavmarkingum, sum eisini talar fyri góðari prísgongd næstu árini. Útboðið av alilaksi á heimsmarknaðinum verður mett at hækka um 1% í 2022, sum er munandi lægri enn vøksturin í eftirspurninginum.

Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni var toskastovnurin á Landgrunninum oman fyri lágmarksstødd av gýtingarstovninum í 2018 og 2019, men síðani 2020 hevur stovnurin aftur verið undir hesum marki. Føroyski hýsustovnurin var í tíðarskeiðinum frá 2008-2017 undir markinum, har serlig verjutiltøk eru neyðug. Hýsustovnurin kom upp um hetta markið í 2018 og hevur verið í vøkstri síðani.

**Mynd 5**
**Føroyska feskfiskaveiðan eftir botnfiski í nøgd*, tús. tons, 1997 til 2021**




* Tølini vísa veiðina, sum verður skrásett um avreiðingarskipanina og í avreiddari vekt. Í avreiðingunum er allur fiskiskapur hjá føroyskum skipum og bátum í føroyskum sjóøki, føroyska feskfiskaveiðan í íslendskum sjóøki og fiskiskapurin á Flemish Cap, sum fer um avreiðingarskipanina. Uppsjóvarfiskur er ikki við í uppgerðini.
Kelda: Hagstovan.

Stovnsmetingarnar fyri tosk og hýsu á Landgrunninum, og serliga framskrivingin, hava verið daprari síðstu tvey árini enn tær vóru frammanundan. Orsøkin til broytingina er lítla tilgongdin. Mynd 5 vísir avreiðingar av botnfiski um avreiðingarskipanina í nøgd síðstu árini. Á myndini sæst, at, nøgdirnar av feskfiski um avreiðingarskipanina eru smærri enn miðskeiðis í 1990'unum.

### *Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum er væl fyri, men trýstið á arbeiðsmarknaðin er sera stórt, og trot er á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum. Trýstið á arbeiðsmarknaðin er ein fløskuhálsur í búskapinum

og forðar fyri, at framleiðslan kann vaksa meira. Arbeiðsloysið er lægri enn áðrenn koronufarsóttin byrjaði í 2020, sí mynd 6.

Arbeiðsloysið við ársenda 2021 var 0,9% av arbeiðsfjøldini (mynd 6A). Arbeiðsloysið hækkaði eitt vet seinnu helvt av 2020, men arbeiðsloysið er nú tað lægsta, sum er skrásett síðani miðskeiðis í 1990'unum, tá ið skrásetingarnar byrjaðu, og arbeiðsloysið er eisini lágt um alt landið.

**Mynd 6**

**Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2005 til feb-2022**




Kelda: Hagstovan.

Talið á løntakarum er eisini methøgt um 27.200 (mynd 7B). Løntakaratalið lækkaði miðskeiðis í 2020 orsakað av koronufarsóttini, men síðani er løntakaratalið vaksið aftur til omanfyri 27.000 løntakarar.

**Mynd 7**

**Lønargjaldingar, býttar á ársfjórðingar, 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2021**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar í øllum vinnugreinum 1. ársfjórðing 1985 til 4. ársfjórðing 2021.
Mynd B vísir lønargjaldingar í fýra útvaldum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2021.
Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum fyri árini 2018 til 2021 og býtt á høvuðsvinnubólkar sæst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar 3,5% í 2021. Serliga lønargjaldingar innan privatu tænastuvinnurnar og almenna tænastu vuksu í 2021 (mynd 7B og talva 1). Lønargjaldingarnar minkaðu um 4% í byggivinnuni og aðrari tilvirking frá februar 2021 til februar 2022.

**Talva 1**
**Lønargjaldingar eftir høvuðsvinnubólkum, 2018-2021, mió. kr.**

| Vinnugrein | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | Munur 2020-21 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.852 | 2.010 | 1.969 | 1.979 | 10 | 0,5 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 1.460 | 1.632 | 1.722 | 1.654 | -68 | -4,1 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.971 | 3.113 | 3.115 | 3.346 | 230 | 6,9 |
| Almenn o.o. tænasta | 3.136 | 3.309 | 3.465 | 3.667 | 202 | 5,5 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **9.419** | **10.064** | **10.271** | **10.645** | **375** | **3,5** |

Kelda: Hagstovan.

Talið av løntakarum vaks frá 2014 til 2020 (mynd 6B) til út við 27 túsund løntakarar. Talið av løntakarum lækkaði síðani til um 25 túsund í apríl 2020 orsakað av koronufarsóttini. Nevnt kann verða, at persónar, sum bara hava B-inntøku ella sum bara hava inntøku uttanlands eru ikki íroknaðir í talið á løntakarum í mynd 6 ella í talvu 2.

**Talva 2**
**Løntakarar í februar eftir høvuðsvinnubólkum, 2019-2022, fólk í tali**

| Vinnubólkur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Munur 2021-22 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.031 | 4.131 | 4.133 | 3.960 | -173 | -4,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 4.132 | 4.377 | 4.257 | 4.198 | -59 | -1,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.481 | 8.557 | 8.511 | 8.738 | 226 | 2,7 |
| Almenn o.o. tænasta | 9.459 | 9.749 | 10.037 | 10.271 | 234 | 2,3 |
| **Løntakarar tilsamans** | **26.103** | **26.814** | **26.938** | **27.166** | **228** | **0,9** |

Kelda: Hagstovan.

Talva 2 vísir gongdina í løntakarum í februar býtt á høvuðsvinnugreinar síðani 2019. Síðani 2019 er løntakaratalið vaksið mest í privatu tænastuvinnunum og innan almenna o.a. tænastu. Vøksturin í talinum av løntakarum í byggivinnuni steðgaði miðskeiðis í 2020, tá ið koronufarsóttin byrjaði og fleiri stórar byggiverkætlanin vóru liðugt bygdar. Síðstu um tvey árini hevur lítil minking verið í

løntakaratalinum í byggivinnuni. Løntakaratalið í byggivinnuni er lækkað um 4% síðsta árið, sí talvu 2.

*Eftirspurningur og brúkaraprísir*

Eftirspurningurin frá húsarhaldum er vaksin støðugt síðani 2014 (mynd 8). Hagtøl fyri vøruinnflutning benda á, at vøksturin í eftirspurningi tók dik á seg í 2020. Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu vaks út við 11% í 2020 og út við 7% í 2021. Vøksturin í eftirspurninginum síðani 2020 er millum annað komin av, at fólk ikki í sama mun hava kunnað brúkt pening til ferðing uttanlands.

**Mynd 8**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2021**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar í myndini.

Kelda: Hagstovan.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at vøksturin í eftirspurninginum fer at hæsa av næstu 1-2 árini. Størsta orsøkin eru stóru príshækkingarnar, sum síggjast á millum annað olju og matvørum.

**Mynd 9**

**Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 = 100, 2005 til 2021**




Kelda: Hagstovan.

Prí-hækkingarnar vóru stórar áðrenn kríggið í Ukraina og fara væntandi at halda fram næstu tíðina. Harafturat kann roknast við hækkandi rentustøði næstu 1-2 árini. Príshækkingarnar fara at gera, at húsarhald hava minni av tøkum peningi til privata nýtslu, og hetta saman við rentuhækkingum fer helst at tálma privatu nýtsluni næstu 1-2 árini.

Á mynd 9, sum vísir hagtøl yvir smásølu í føstum prísum fyri ymiskar vørubólkar, sæst, at privati eftirspurningurin hækkaði í 2020 undir koronufarsóttini. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingar á seldum mongdum. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin er vaksin síðani 2020. Vaksandi eftirspurningurin sæst eisini í inntøkunum hjá landinum av meirvirðisgjaldinum í 2020 og aftur í 2021.

Sambært konjunkturkanningini frá Hagstovuni í januar 2022 eru húsarhald heldur minni bjartskygd um framtíðina sammett við miðskeiðis í 2021. Tað eigur at verða nevnt, at kanningin er gjørd áðrenn russisku innrásina í Ukraina.

**Mynd 10**

**Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til jan-2022**




Kelda: Hagstovan.

Flestu húsarhald rokna við at kalla óbroyttum arbeiðsloysi næsta árið og rokna eisini við somu búskapargongd næsta árið. Mynd 10 vísir samanvigaða vísitalið og vísitalið fyri húsarhald. Samanvigaða konjunkturvísitalið fyri vinnu og húsarhald hækkaði frá 11 til 29 í síðstu konjunkturkanningini (mynd 10A).

Brúkaraprístalið hevur verið rættiliga støðugt síðani fíggjarkreppuna fyri 14 árum síðani, men seinna hálvár 2021 sóust stórar hækkingar í prístalinum, og hækkingarnar fara helst at halda fram í 2022 og 2023. Síðsta árið eru brúkaraprísir hækkaðir 3,4%, sum er størsta hækking í brúkaraprísunum síðani fíggjarkreppuna, sum byrjaði í 2008. Brúkaraprístalið er víst í mynd 11 niðanfyri.

Týdningurin av brennievni í føroyska innflutninginum sæst av, at um 15% av innflutninginum í 2021 var brennievni. Við hækkandi oljuprísunum, sum hava verið síðani kríggi í Ukreina byrjaði, fer innflutningurin av brennievni væntandi at fylla lutfalsliga meira í 2022. Rentustøðið hevur eisini stóra ávirkan á gongdina í brúkaraprísum og serliga á kostnaðin av at eiga ella leiga sær bústað. Síðstu árini hevur rentustøðið verið sera lágt, og kappingin hevur verið og er framvegis hørð millum peningastovnarnar. Kappingin er eisini við realkredittlánini, sum peningastovnarnir bjóða. Næstu 1-2 árini kann roknast við hækkandi rentum, sum fer at síggjast aftur í brúkaraprístalinum.

**Mynd 11**

**Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 4. ársfjórðing 2021, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

*Gongdin í til- og fráflyting*

Gongdin við nettotilflyting til landið heldur fram, hóast ávirkanirnar frá koronufarsóttini síðstu tvey árini. Tilflytingin minkaði nakað í 2020, sum óivað kom av koronufarsóttini. Í løtuni eru ikki tekin um, at gongdin við nettotilflyting og fólkavøkstri, sum byrjaði í 2014, er um at steðga aftur.

**Mynd 12**

**Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðir samanlagt, til- og fráflyting, jan-2007 til feb-2022**




Viðm.: Grønu og reyðu stabbarnir vísa ávikavist til- og fráflyting hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Nettotilflytingin kemur bæði av minni fráflyting og størri tilflyting til landið. Størra ískoytið til fólkavøksturin kemur av minni fráflyting (mynd 12). Nettotilflytingin er á áleið sama støði sum árini beint eftir aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum (mynd 13). Fráflytingin hevur verið 1.100-1.200 fólk um árið síðstu árini, og tilflytingin í 2021 var út við 1.800 fólk.

Sum partur av fólkatalinum hevur fráflytingin síðani 2015 verið tann minsta, sum er skrásett, síðani nágreiniligar skrásetingar byrjaðu í 1970. Tilflytingin hevur verið stór síðstu árini og serliga síðani

2016. Samanlagda úrslitið av minni fráflyting og størri tilflyting er, at nettotilflytingin er vaksin í stórum.

Gongdin við nettotilflyting til landið er tekin um, at arbeiðsmarknaðurin hevur verið væl fyri í fleiri ár og at fleiri størv hava tikið seg upp í landinum. Ein onnur orsøk til gongdina er, at útbúgvingarmøguleikarnir eru vorðnir betri og at færri tí mugu fara av landinum at útbúgva seg. Síðstu árini eru fleiri nýggjar útbúgvingar byrjaðar bæði á miðnámsstigi og innan hægri útbúgvingar. Nettotilflytingin býtt á mánaðir og ár er víst í myndunum 12 og 13.

**Mynd 13**
**Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2021**




Kelda: Hagstovan.

At nettotilflyting er til landið er eitt gott tekin fyri búskapin. Heldur tilflytingin fram, fer tað at betra langtíðarhaldførið í búskapinum. Hóast nettotilflyting er til landið nú, benda framrokningar á, at aldurs- og fólkasamansetingin fer at broytast næstu árini, soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri.

**Mynd 14**
**Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985-2022**




Kelda: Hagstovan.

Á mynd 14 omanfyri sæst, at fólkatalið í Føroyum nærkast 54 tús. fólk (sí eisini talvu 3). Myndin vísir eisini, at fólkatalið ikki hækkaði stórvegis frá 1990 til 2014. Veruligur og støðugur

fólkavøkstur hevur nú tikið seg upp í landinum eins og árini um síðsta aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum.

Størsti parturin av fólkavøkstrinum síðstu árini hevur verið í miðøkinum í landinum og serstakliga í høvuðsstaðarøkinum og í Eysturoynni. Nevnast kann, at Suðuroyggin og Sandoyggin hava ikki havt sama fólkavøkstur sum onnur øki í landinum síðani 2014. Í talvu 3 síggjast broytingar í fólkatalinum síðstu 12 mánaðirnar býtt á høvuðsøki.

**Talva 3**
**Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2021 til 1. feb. 2022**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. feb. 2021 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2022 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 6.296 | 17 | 40 | 6.353 | 57 | 0,9 |
| Eysturoy | 11.985 | 77 | 171 | 12.233 | 248 | 2,1 |
| Suðurstreymoyarøkið | 21.368 | 107 | 332 | 21.807 | 439 | 2,1 |
| Norðstreymoyarøkið | 4.001 | 35 | -7 | 4.029 | 28 | 0,7 |
| Vágoy | 3.365 | 18 | 14 | 3.397 | 32 | 1,0 |
| Sandoy | 1.291 | -3 | -25 | 1.263 | -28 | -2,2 |
| Suðuroy | 4.662 | -5 | 13 | 4.670 | 8 | 0,2 |
| **Alt landið** | **52.968** | **246** | **538** | **53.752** | **784** | **1,5** |

Kelda: Hagstovan.

## Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Gongdin á handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini er merkt av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað munandi síðani 2013. At býtislutfallið er batnað merkir, at prísirnir á útfluttum vørum eru hækkaðir sammett við prísirnir á innfluttum vørum, til dømis á olju. Býtislutfallið versnaði aftur í 2020 og 2021 av høgum oljuprísum og fer helst at versna eisini í 2022.

Síðani 2013 hava avlop verið á handilsjavnanum, og roknast kann við avlopi aftur í ár. Avlopið á handilsjavnanum í 2021 vaks sammett við í 2020, orsakað av størri útflutningi av aldum laksi. Roknast kann við, at avlopið á handilsjavnanum hækkar aftur í 2022. Millum annað fer útflutningurin væntandi at vaksa aftur í 2022.

Myndirnar 15 og 16 vísa gongdina í handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini. Handilsjavnin fevnir bara um vøruhandil við útlond; tænastuveitingar til og frá útlondum eru sostatt ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*. Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á út við eina mia. kr. árliga, tó at óvissa er um hesa uppgerðina.

**Mynd 15**

**Innflutningur og útflutningur av vørum, mió. kr., 1988 til 2021**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við í uppgerðini av handilsjavnanum.
Kelda: Hagstovan.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningsvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 15 omanfyri, er føroyski útflutningurin vaksin úr 4,1 mia. kr. í 2009 til 10 mia. kr. í 2021. Helst hækkar útflutningurin aftur í 2022. Útflutningurin er sostatt meira enn tvífaldaður hetta tíðarskeiðið.

**Mynd 16**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998 til 2021**




* Talið fyri 2021 er meting og skal lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

## Heimsbúskapurin

Útlitini fyri búskaparvøkstur í 2022 og 2023 eru versnað síðstu mánaðirnar av ymiskum orsøkum. Størsta orsøkin er kríggið í Ukraina, sum longu hevur og fer at ávirka allan heimsbúskapin, harundir føroyska búskapin. Fyribils verður roknað við, at serliga 2022 verður ávirkað av krígnum í Ukraina og at ávirkanin verður minni í 2023, men óvissa er sjálvsagt knýtt at hesum.

Aðrar orsakir eru príshækkingar á rávørum, olju, gassi og matvørum. Stórar príshækkingar vóru eisini áðrenn russisku innrásina í Ukraina, og príshækkingarnar vera óivað størri orsakað av krígnum í Ukraina. Harafturat eru fløskuhálsar í heimshandlinum og á arbeiðsmarknaðinum í fleiri londum, sum tálma vøkstrinum.

Flestu lond í vesturheiminum settu avmarkingar í verk síðst í 2021, tá ið omikron-frábrigdið fór at spjaða seg. Avmarkingarnar høvdu við sær lægri búskaparvøkstur fyrstu mánaðirnar í 2022, men nógv bendir á, at nýggja frábrigdið eisini kann vera byrjanin til endan á koronufarsóttini.

Hækkandi olju- og orkuprísir og fløskuhálsar í heimshandlinum hava við sær hægri prísvøkstur enn áður væntað. Hetta hevur serliga verið galdandi í USA og í ymiskum vakstrarlondum, men eisini í Evropa hevur prísvøksturin verið hægri enn væntað síðstu mánaðirnar. Hetta hevur serliga verið galdandi síðani russisku innrásina í Ukraina.

Flestu eygleiðarar rokna við, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at hækka leiðandi renturnar nakrar ferðir í 2022. Nógv bendir eisini á, at fíggjarpolitikkurin í USA verður minni stimbrandi næstu 1-2 árini enn áður mett. Harafturat hevur miðbankin í USA givið ábendingar um, at hann fer at minka tey stuðulstiltøk, sum miðbankin hevur sett í verk fyri at stuðla búskapin síðstu árini. Í USA og Evropa eru eisini fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum, sum tálma búskaparvøkstrinum.

Samanumtikið verður roknað við minni búskaparvøkstri í 2022 í Evropa og heimsbúskapinum sammett við fyri hálvum ári síðani. Roknast kann við, at heimsbúskapurin veksur um 3% í 2022.

Búskapurin í Evropa vaks sambært metingum um 5% í 2021 og veksur væntandi 2-3% í 2022 og 2023. Lond, sum hava stóra ferða- og tænastuvinnu, vórðu harðast rakt av koronufarsóttini, og har var afturgongdin størst í 2020. Vøksturin í 2021 kom í stóran mun av, at færri avmarkingar vóru í 2021 og at gongd kom á tænastuvinnur, ferðavinnu og privatu nýtsluna.

Búskapirnir í vesturheiminum hava verið tálmaðir av fløskuhálsum í heimshandlinum, príshækkingum á olju og øðrum rávørum og av nýggja frábrigdinum av koronu, sum tók seg upp síðst í 2021. Fíggjarmarknaðir hava eisini verið óstøðugir síðst í 2021 og fyrstu mánaðirnar í 2022.

Búskapurin í Evropa og allur heimsbúskapurin hava síðstu nógvu árini verið stimbraðir av stórum stuðulstiltøkum frá miðbankum og av søguliga lágum rentum. Miðbankin í USA hevur boðað frá, at ætlanin er at hækka leiðandi renturnar nakrar ferðir í 2022. Talan verður helst um smáar rentuhækkingar, og hóast renturnar hækka nakað úr verandi søguliga lága støði, verður rentustøðið framvegis helst lágt næstu 1-2 árini, serliga um vit sammeta við rentustøðið sæð yvir longri tíðarskeið. Útlitini fyri búskaparvøkstur og prísvøksturin í Evropa tala fyri, at rentustøðið í Evropa eisini fer at hækka nakað næstu 1-2 árini.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og kommunum síðstu árini. Mynd 17 niðanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við mettum tølum fyri 2021, fíggjarlógartølum fyri 2022 og tølum fyri árini 2023-27 úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar fyri fíggjarárið 2023.

**Mynd 17**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2021, játtanar- og ætlanartøl fyri 2022 til 2027**




Viðm.: Tølini fram til og við 2020 eru roknskapartøl. Avlopið í 2021 verður mett til um 150 mió. kr. Tølini fyri 2022 eru játtanartøl, og tølini fyri árini 2023 til 2027 eru úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar. Kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015. Tí lækkaðu inntøkur og útreiðslur hjá landinum í 2015.
Kelda: Gjaldstovan.

Landskassin hevði hall frá 2008 til 2015. Síðani vóru avlop í landskassanum frá 2016 til 2019. Árið 2020 var nógv merkt av koronufarsóttini, tá ið hall var í landskassanum á 291 mió. kr. Úrslitið hjá landskassanum fyri 2021 er ikki endaliga gjørt upp enn, men Fíggjarmálaráðið roknar við, at úrslitið hjá landskassanum verður um 150 mió. kr. í avlopi í 2021.

Úrslitið á samtyktu fíggjarlógini fyri 2022, sum sæst í mynd 17, er avlop á um 40 mió. kr., men Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin fer at hava hall á 100-150 mió. kr. í 2022. Ein orsøk til avlopið í 2021 á um 150 mió. kr. er, at stórur partur av løgujáttanunum ikki vórðu brúktar, men eru fluttar fram til 2022. Harafturat vóru inntøkurnar hjá landinum frá skattum og avgjøldum munandi størri enn væntað í 2021. Framfluttu løgujáttanirnar til 2022 hava síðani við sær, at roknað verður við halli í landskassanum í 2022.

Inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini, meðan útreiðslurnar vaksa meira støðugt og ikki broytast í sama mun. Í 2021 vuksu inntøkurnar hjá landinum munandi skjótari enn útreiðslurnar, orsakað av góðari gongd í búskapinum og vaksandi privatari nýtslu. Sambært fyribils tølum fyri 2021 og játtanartølum fyri 2022 hækkaðu rakstrarútreiðslurnar hjá landinum um 3,5% í 2021 og hækka um 3% í 2022.

Mynd 18 vísir gongdina í langfreistaðu skuldini (brutto) og innistandandi hjá landinum. Gongdin frá 2008 til 2014, har útreiðslurnar vóru hægri enn inntøkurnar, sæst aftur sum vaksandi skuld hesi árini. Føroyski búskapurin vaks kortini somikið nógv hesi árini, at skuldin ikki vaks stórvegis sum

partur av búskapinum. Síðani 2014 hevur verið betri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum. Orsøkin til stóra lopið í skuldini frá 2017 er lánið til felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum verður tald við sum skuld hjá landinum.

**Mynd 18**

**Langfreistaða skuld landskassans og gjaldføri landskassans í mió. kr., 1997 til 2022**




Viðm.: Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.

Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Sambært Landsbanka Føroya eigur skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar at verða íroknað skuldina hjá landinum frá 2017. Tunnilsfelagið tók lánið síðst í 2016. Lánið verður íroknað landskassaskuldina, tí landið hevur veðhildið fyri lánið og í løtuni rindar eina upphædd árliga til felagið sum partur av veðhaldinum. Í løtuni er felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar ikki sjálvberandi og er ikki ført fyri at rinda alla skuldina aftur við egnum inntøkum. Tí er skuldin hjá felagnum tald við í skuldina hjá landinum.

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið, um vit sammeta við onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 20% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á um 1,5 mia. kr. ella 5-10% av BTÚ. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur harafturat skuld á 2,68 mia. kr., ella um 12% av BTÚ, sum landið hevur veðhildið fyri.

Hetta gevur tilsamans eina almenna bruttoskuld á um 40% av BTÚ, sum er nakað tað sama sum í Danmark. Almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa er til sammetingar um 90% av BTÚ í miðal, og almenna bruttoskuldin í Danmark er um 40% av BTÚ. Almenna skuldin í Íslandi er mett til um 80% av BTÚ. Her er talan um sonevnda EGS-skuld (*ØMU-gæld*), sum er sambærilig millum lond.

Fyri haldførið í almenna búskapinum er týdningarmikið, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini. Hetta merkir, at nettoskuld í % av BTÚ ikki skal hækka støðugt yvir tíð, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturgongdini.

Búskaparráðið hevur síðstu árini mett um langtíðarhaldførið í almenna búskapinum. Í nýggjastu frágreiðingini frá ráðnum verður nevnt, at haldførisavbjóðingar framvegis eru í almenna geiranum, og at tær í stóran mun stava frá broyttari fólkasamanseting, sum roknast kann við í framtíðini.

**Mynd 19**

**Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri) í mió. kr., 1997 til 2021**




Viðm.: Nettoskuld er í myndini víst sum langfreistaða skuldin hjá landskassanum frádrigið gjaldførið hjá landskassanum. Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Gjaldstovan.

Ein óvissa viðvíkjandi almenna búskapinum næstu árini er, at rentustøðið á skuldini er sera lágt í løtuni. Roknast kann við, at rentustøðið fer at hækka næstu 1-2 árini, hóast tað er ógjørligt at meta um, hvussu nógv rentan fer at hækka.

Tá ið rentustøðið hækkar, fer tað, sum frálíður, at kosta landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Lánsbrævaskuldin hjá landinum er í løtuni um 4 mia. kr., og gjaldføri landsins er um 3,4 mia. kr. Nettoskuldin er sostatt um 600 mió. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Gongdin í nettoskuldini hjá landskassanum er víst í mynd 19.

Hvørt prosent-stig, sum miðalrentustøðið á lánsskuldini hækkar næstu árini, fer, sum frálíður at kosta landinum um 40 mió. kr. brutto árliga í hægri rentuútreiðslum av skuldini. Hækkar rentustøðið, fær landið hinvegin eisini hægri avkast av gjaldførinum. Afturgjaldstíðin á lánsbrævaskuldini hjá landskassanum hevur síðstu árini verið 4-5 ár. Tí ávirkar tað ikki rentuna á allari skuldini í einum, tá ið altjóða rentustøðið hækkar.

Kommunurnar hava samanlagt havt hall síðani 2018, meðan sosialu grunnarnir hinvegin hava havt avlop samanlagt í nøkur ár. Úrslitini hjá kommununum fyri 2021 eru ikki gjørd endaliga upp enn, men kommunurnar høvdu sannlíkt lítið avlop á 5-10 mió. kr. í 2021. Úrslitið hjá tí almenna tilsamans í 2021 var helst hall á 300-400 mió. kr., ella um 1,5% av BTÚ.